# Ellisakførini verða »flotað« flaggdagin

**Fimtanda árið á rað fara limir í Føroya Ellisakførum at sýna fram gamlar bilar og motorsúkklur í Havn flaggdagin. Tað er fastur siður, at ellisakførini verða »flotað« flaggdagin _ og soleiðis hevur verið síðani 1992, sum var árið, tá felagið Føroya Ellisakfør varð stovnað**

ELLISAKFØR

Eins og í fjør møtast ellisakførini á Shellstøðini við Ringvegin, haðani koyrt verður oman á Kongabrúnna kl 14. Á Kongabrúnni verða akførini sýnd fram til flaggdagshaldið byrjar, og síðani fara tey í raðkoyring niðan aftur á Shell-støðina við Ringvegin, har tey verða sýnd fram til kl 17.

Á Shell-støðini verður kaffi og winerbreyð at fáa - og okkurt gott til børnini eisini.

Áhugafelagið Føroya Ellisakfør varð stovnað í 1992. Endamálið er at varðveita gomlu akførini í upprunastandi og at fáa til vega vitan og kunnleika um akfør, ferðslu og flutning upp gjøgnum tíðirnar. Felagið arbeiðir eisini við at savna føroysku bilasøguna, sum ætlanin er at geva út í bók.

Fyrsti bilur kom til Føoya 6. mai í 1922, tað var ein Ford TT lastvognur, sum Johannes Olsen og Júst Sivertsen í Havn keyptu frá Vilhelm Nielsen og Wenzel Petersen, sum høvdu smiðju í Quillingsgarði í Erling Jalsgøtu í Havn.




*Flaggdagin verður høvi at síggja ellisakfør sýnd fram bæði á Kongabrúnni og á Shellstøðini við Ringvegin*



*Tveir »ellismenn« við motorsúkklum: Sonne Smith og 84 ára gamli Sverri Mortensen á Argjum, sum er elsti limur í felagnum*

Rúsdrekkasøla Landsins

## Handilslærlingar

Søkt verður eftir 2 handilslærlingum við sergrein innan sølu til sølubúðina í Havn. Sergreinin innan sølu er við serligum denti á vín og spiritus.

Læran umfatar allar tættir í rakstri av einum nútímans handli við denti á sølu, vørukunnleika og kundatænastu.

**Lærlingurin**
Lærlingurin skal hava hug til at nema sær kunnleika og førleika innan økið, sum Rúsdrekkasølan virkar á. Lærlingurin skal vera eldhugaður, initiativríkur og hava ynski um at vera við til at menna virksemið, sum Rúsdrekkasøla Landsins hevur. Lærlingurin skal verða fyrikomandi, álítandi og hava góð samstarvsevni. Eisini skal lærlingurin duga væl at samskifta við onnur og hava ynski um at veita góða tænastu á einum høgum tænastustøði.

Tey ið søkja, skulu hava FHS-, HH-, HF-, Student-, HIF- ella HTX-útbúgving.

**Umsóknarfreist**
Skrivlig umsókn við avriti av prógvum og møguligum viðmælum skal vera Rúsdrekkasølu Landsins í hendi í seinasta lagi 25. apríl 2006.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Elsu Mariu Holm Olsen á telefon 31 42 77 ella teldupost emo@rusan.fo.

TEAM85

Rúsdrekkasøla Landsins
**Rúsdrekkasøla Landsins**
*Hoyvíksvegur 51 Postboks 3069 FO-110 Tórshavn*
*Tel (+298) 31 42 77 Fax (+298) 31 22 60*




## SKRIVSTOVUFÓLK

Søkt verður eftir skrivstovufólki til Koyrikortdeildina at seta 1. juli 2006. Talan er um fast starv, ið er skipað sum fulltíðarstarv.

UPPGÁVAN
Uppgávan fevnir m.a. um:

- Avgreiðslu av viðskiftafólki og telefonavgreiðslu
- Skráseting og framleiðslu av koyrikortum
- Umsiting av tíðum til ástøðis- og koyriroyndir
- Málsviðgerð
- Postavgreiðslu
- Kassauppgerð

FØRLEIKAKRØV
Vit hugsa okkum ein persón við skrivstovuútbúgving, HH ella líknandi útbúgving og arbeiðsroyndum á skrivstovu. Dentur verður lagdur á góð samstarvsevni og at viðkomandi er fyrikomandi og kundavinaligur. Tað er ein treyt, at viðkomandi hevur kunnleika til at arbeiða við teldu.

SETANARTREYTIR
Starvið er lønt eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið. Starvssetanin hoyrir undir Vinnumálaráðið við tilhoyrandi stovnum, um Løgmansskrivstovuna og onnur aðalráð.

**Upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til:**

Tórunn S. Miðberg, deildarleiðara á tlf. 35 04 00 ella 35 04 20. Umsóknir við møguligum prógvum og viðmælum skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 21. apríl 2006.

*Akstovan er stovnur undir Vinnumálaráðnum og hevur sum endamál at fremja akfaratøkniligar kanningar og akfaraeftirlit, stila fyri koyriroyndum, útvega fólki koyrikort, umsita skráseting av koyrikortum og umsita akfaraskráseting, vegskatt og skrásetingargjøld.*

*Umframt høvuðsdeildina í Tórshavn hevur Akstovan sýnsdeildir um alt landið. Á Akstovuni starvast 19 fólk.*

AKSTOVAN

Akstovan | Hoyvíksvegur 57 | Postsmoga 3206 | FO-110 Tórshavn
Tel +298 35 04 00 | Fax +298 35 04 01 | www.akstovan.fo | akstovan@akstovan.fo

REPROZ